Kappast um at vera fyrstur at bora

Tað verður um reppið, hvat av teimum báðum oljufeløgunum, BP og Statoil, sum verður fyrst at seta borin í føroysku undirgrundina. Kann vera, at tað verður Statoil, sum hevur munin, tá avtornar. Bæði løgmaður og oljuráðharrin verða ætlandi hjástæddir, tá boringin byrjar

STARTSKOT TIL OLJULEITING

Jan Müller



Kortið er spildurnýtt og síggja vit longu, at Smedvig, sum eigur boriskipið West Navion hevur markerað fyrstu boringina á føroyska landgrunninum. Pílurinn er tilvildarliga settur. Boringin verður longur suðuri nær markið. Hinumegin markið er skipið við at bora fyri Conoco.

Sum tíðin hevur gingið seinastu mánaðirnar hevur fyrst annað felagið staðið til at byrja fyrst, síðani hitt. Og so hava tey liðið borð um borð. Nú kann verða spurt, um hetta hevur nakran týdning fyri feløgini! Neyvan, um hugsað verður um endamálið sjálvt: at finna olju. Men nakað av prestisju er kortini í, hvat felag tað verður, sum setir borin í fyrst. Eitt nú tí at bæði løgmaður og oljumálaráðharrin eftir ætlanini skulu vera umborð, tá trýst verður á startknøttin, ella stutt eftir at boringin er byrjað.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður sigur, at sjálvt um tað ikki er vanligt í øðrum londum, at løgmaður og oljuráðharrin fara umborð á boripall, tá boring byrjar, so hevði tað verið uppá sítt pláss hesaferð. Løgmaður sigur, at hann hevur frætt okkurt um, at hann møguliga skal umborð, tá byrjað verður at bora. Sjálvur heldur hann hetta vera so mikið stóra hending fyri Føroyar, at hann hevði verið fegin at fingið slíka innbjóðing.

Eftir tí Sosialurin skilur, so er tað nú heilt greitt, at boringarnar byrja umleið 15. juli ella møguliga nakað fyrr. Boripallurin Sovereign Explorer, ið skal bora fyri Statoil, Philips, Veba og Enterprise, kemur á boristaðið »Longan« umleið 5-7. juli. Síðani skal hann ankrast upp, og tað tekur so nakrar dagar. Boriskipið West Navion, sum skal bora fyri BP, verður á boristaðnum »Svínoy« í seinasta lagi 15. juli, men okkurt kundi bent á, at tað verður eina lítla viku fyrr, so mikið skjótt hevur gingist við arbeiðinum hinumegin markið. Tosað verður tí helst um tíðarskeiðið millum 8. og 15. juli, at tað verður byrjað at bora. Og tað er í hesum sambandi, at løgmaður og oljumálaráðharrin skulu til at gera seg klárar at fara umborð á antin boripall ella boriskip – at verða eygleiðarar til fyrstu boringina á landgrunninum nakrantíð. So nú fáa vit at síggja, hvør verður fyrr, BP ella Statoil. Men tá tað so kemur til at bora niður í løgini, har mett verður, at oljan finst, so fer tað at ganga skjótari hjá BP, tí tað er skjótari at bora við einum slíkum nútímans skipi enn við einum boripalli.

Sosialurin skilur, at í báðum førum verður borað rættiliga djúpt, helst einar góðar 4000 metrar niður. Blaðið skilur eisini, at bæði BP og Statoil fara at bora niður gjøgnum fleiri strukturar ella prospekt, sum tað verður rópt á fakmáli. Tvs. at møguleiki kann vera fyri at finna olju og gass í fleiri enn bara einum lagi. Nettupp hetta ger boringarnar so mikið spennandi og lovandi.

Nógv verður gitt um møguleikan fyri at raka við olju í fyrstu boringunum og um møguliga stødd á fundum. Tað hevur ljóðað, at bæði BP og Statoil síggja áhugaverdar strukturar, sum líkjast teimum, ið longu eru funnin bretsku megin markið og sum í dag framleiða stórar nøgdir av olju. Onkur kelda vil vera við, at hjá Statoil rokna tey við at finna eina ella annan elefant, sum er eitt risastórt fund. Eisini verður tosað um stórar goymslur av olju í øllum hesum økinum.

Løgmaður fyrstu ferð hann vitjaði boripall í Norðsjónum sær fram til at vera til steðar, tá fyrsta boringin byrjar við Føroyar

Mynd: Jan Müller

Oljumálaráðharrin og fíggjarmálaráðharrin her á vitjan í Alaska fyri at læra av teirra royndum. Nú sleppa vit so at gera okkara egnu royndir

Mynd: Jan Müller

Eyðun Elttør, oljumálaráðharri metir komandi mánaðirnar verða nakrar av teimum mest týðandi og áhugaverdu fyri Føroyar nakrantíð.

Mynd: Jan Müller